# Janus og Ingálvur heiðurslimir




*Tær báðar bronsumyndirnar, sum Hans Pauli Olsen hevur tilevnað av teimum báðum »grand old men« í føroyskari list*

*Mynd: Bárður*

Fram til fríggjadagin í farnu viku hevði Listafelag Føroya bert ein heiðurslim, men hetta talið er nú trífaldað.

Afturat William Heinesen, sála, eru Ingálvur av Reyni og Janus Mohr nú eisini settir á listan. Ein heiður, sum teir báðir hava fingið fyri drúgva og slóðbrótandi arbeiði sítt innan føroyska mynd- og høggmyndalist.

Báðir tveir tóktust teir vera fullkomuliga tiknir av bóli, tá teir fingu skjalið við prógvnum um, at teir nú eru at rokna sum heiðurslimir. Undan handanini vistu teir av, at Hans Pauli Olsen hevði latið gjørt tvær andlitsmyndir í bronsu, sum framyvir verða at síggja á Listaskálanum, men teir vistu ikki av, at somikið stórur hávi skuldi gerast burtur úr hesum.

Á samkomuni tók kendi danski listaummælarin, Bent Irve eisini orðið, og hann rósti teimum báðum fyri tann týdning, sum teir báðir hava havt fyri føroyska list. Eitt arbeiði, sum avgjørt ikki altíð hevur verið tað lættasta, men sum í dag hevur viðført, at bæði teir og føroysk list í dag standa høgt í metum í norðurlendskum høpi.

**-jm**

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi, seinni av ymsum ættum. Um kvøldið skrið ella stormur av útsynningi og ælingur. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, seinnapartin minni vindur. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi, seinni minni vindur av vestri. Sólglottar, men eisini ælingur og hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í stívt andøvsgul av útsynningi og yvirhøvur turt, men sunnudagin veksur hann vindin upp í hvassan vind og regn ella ælingur. Hitin millum 8 og 12 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -- |
| Nuuk | 6 |
| Qaqortoq | 8 |
| Ammassalik | 10 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 10 |
| Seyðisfjørður | 10 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 16 |
| London | 18 |
| Tromsø | 14 |
| Bergen | 13 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 21 |
| Keypmannah. | 22 |
| Helsinki | 18 |
| Moskva | 18 |
| Berlin | 25 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 19 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 25 |
| Róm | 22 |
| Malorca | 26 |
| Athen | 30 |
| Malta | 25 |
| Tunis | 28 |
| Beijing | 26 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 18 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 20 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 992 hPa. millum Íslands og Føroya fer norðureftir. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa. sunnan fyri Hvarvið kemur móti Føroyum og dýpist nógv.




**Í dag:**
Stormlágtrýstið yvir Føroyum fer spakuliga norðureftir og grynnist.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/8 kl. 06⁰⁰– 23/8. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 11,9°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 3,0 mm – mált frá 22/8 kl. 06⁰⁰– 23/8 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í august: 61,5 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

| | |
|---|---|
| 19. august | Fullmáni/Mánin næstur jørðini |
| 26. august | Seinna kvarter |
| 1. september | Mánin longst frá jørðini |

Kelda. Álmanakkin 2005

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 24. aug | 11.01 | 23.24 | 10.01 | 22.24 | 10.16 | 22.39 | 00.38 | 13.01 | 01.38 | 14.01 | 09.16 | 21.39 | 08.16 | 20.39 | 11.16 | 23.39 | - | 12.16 | 10.46 | 23.09 | - | 12.01 |
| 25. aug | 11.48 | - | 10.48 | 23.26 | 11.03 | 23.41 | 01.24 | 13.48 | 02.24 | 14.48 | 10.03 | 22.41 | 09.03 | 21.41 | - | 12.03 | 00.39 | 13.03 | 11.33 | - | 00.24 | 12.48 |
| 26. aug | 00.26 | 13.04 | - | 12.04 | - | 12.19 | 02.26 | 15.04 | 03.26 | 16.04 | 11.19 | 23.58 | 10.19 | 22.58 | 00.41 | 13.19 | 01.41 | 14.19 | 00.11 | 12.49 | 01.26 | 14.04 |
| 27. aug | 01.43 | 14.22 | 00.43 | 13.22 | 00.58 | 13.37 | 03.43 | 16.22 | 04.43 | 17.22 | - | 12.37 | 11.37 | - | 01.58 | 14.37 | 02.58 | 15.37 | 01.28 | 14.07 | 02.43 | 15.22 |
| 28. aug | 02.48 | 15.15 | 01.48 | 14.15 | 02.03 | 14.30 | 04.48 | 17.15 | 05.48 | 18.15 | 01.03 | 13.30 | 00.03 | 12.30 | 03.03 | 15.30 | 04.03 | 16.30 | 02.33 | 15.00 | 03.48 | 16.15 |


Havnar Bio
kall Coca-Cola




Herbie – for fuld udblæsning

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 23.08 | kl. 18.00 | kl. 20.15 |
| Mikudag | 24.08 | kl. 18.00 | kl. 20.15 |
| Hósdag | 25.08 | kl. 18.00 | kl. 20.15 |

Ensk tala – danskur tekstur




The Island FRUMSÝNING

| | | | |
|---|---|---|---|
| Týsdag | 23.08 | kl. 20.00 | kl. 22.30 |
| Mikudag | 24.08 | kl. 20.00 | kl. 22.30 |
| Hósdag | 25.08 | kl. 20.00 | kl. 22.30 |




Hitchikers Guide to the Galaxy

| | | |
|---|---|---|
| Týsdag | 23.08 | kl. 22.45 |
| Mikudag | 24.08 | kl. 22.45 |
| Hósdag | 25.08 | kl. 22.45 |




Fantastic 4 Four

| | | |
|---|---|---|
| Týsdag | 23.08 | kl. 17.30 |
| Mikudag | 24.08 | kl. 17.30 |
| Hósdag | 25.08 | kl. 17.30 |

Seinasta sýning

Komandi filmar

Svigermonster FRUMSÝNING
Fríggjadag 26.08

Dark Water FRUMSÝNING
Fríggjadag 26.08

www.bio.fo • Telefon 31 19 56
Stórt úrval av DVD-filmum til sølu







Sosialurin

5 707265 100036 >